# Rentan fer í botn

Í morgin fer Evropeiski Miðbankin, ECB, at áseta nýggja rentu, og flestu eygleiðarar eru á einum máli um, at rentan fer eitt hálvt prosentstig niður, so hon verður eitt prosent, ið er tað lægsta nakrantíð, síðani evran kom. Danski Tjóðbankin fer væntandi at taka sama stig, og har fer rentan væntandi úr 2,25 prosentum niður í 1,75 prosent, sum er tað lægsta í Danmark nakrantíð. Evropeiskir búskaparfrøðingar vænta, at Evropeiski Miðbankin fer at lækka rentuna eina ferð afturat í næstum. Tað verður helst í summar, og tann lækkingin verður helst eisini 0,5 prosentstig, siga teir.



# Fyribyrgir blóðtøppi

Fólk, sum taka heilivág fyri at minka um kolesterolið í blóðinum, eru í nógv minni vanda fyri at fáa blóðtøpp í beinini enn onnur. Sambært einari altjóða kanning minkar vandin eina helvt, skrivar Ritzau. Í kanningini hava serfrøðingar kannað næstan 18.000 frísk fólk, tey flestu amerikanarar. Danski yvirlæknin Børge Nordestgaard hevur verið við í kanningini, og hann sigur úrslitið vera tað mest slóðbrótandi tey seinastu 15 árini. Hann hevur sjálvur gjørt kanningar við 300 monnum og kvinnum, og tær vístu, at vandin fyri blóðtøppi í beinunum minkaði 43 prosent, um fólk fingu heilivág, sum skal skerja kolesterolið í blóðinum.



*Ì barnagarðinum á Hamrinum á Argjum sleppa dreingirnir at berjast, og tað farliga lívið við svørðum og øðrum spælivápnum livir lið um lið við dukkulisurnar hjá gentunum*





***… men teir mugu <u>eisini</u> læra at seta orð á kenslurnar, so teir ikki koma út í lívið og halda, at tað er í lagi at loysa trupulleikar við harðskapi***

*Claus A. Rasmussen, pedagogur*